## Eg meini tað



Rigmor Dam,
lærari

# Óndir jólamenn í Havn

Eg havi sæð ein óndan jólamann.. ikki bara var hann óndur, hann var eisini danskur..!

Hetta var í Havn, til eina av teim mongu jólaveitslunum hjá einum felag, har sonurin er so heppin at vera limur. Næstan øll børnini fingu ein stóran leskiligan jólaposa, men tey seinastu børnini í rúgvuni, harímillum sonurin, fingu einans ein heingiboppuposa við tveimum mandarinum í!

Sjálvsagt forvitnast krakilska mamman eftir orsøkini til fadesuna, samstundis sum flóvi sonurin hálar í bundnasjalið, „kom nú mamma, tað ger einki, vit eiga so nógv gott har heima..!“. „Øhh..“ letur í jólamanninum „...vi har ikke lavet pakker nok“. „Nei, tað síggi eg. Og tað, hóast vit hava teknað okkum og goldið 40,- kr. fyri at luttaka!! - Ná, men gott er, nú fara vit oman í kioskina at keypa bomm, kom góði“.

Aja, enn einaferð setti jólamaðurin meg í ‚forleyginheit‘. Tað hendir næstan hvørt ár og nú eri eg við at vera rættiliga troytt av honum. Tí hvat skal eg siga við børnini, tá hann ferð eftir ferð upptraðkar djúpt órættvíst og ólogiskt og í dýrastu andsøgn við hugmyndina av gávumilda gamla abbanum, sum vitjar heimini hjá øllum børnum hvørt ár, óansæð hvussu tey hava skikkað sær.

Trupulleikin tykist at vera, at eingin kennur søguna um jólamannin, eiheldur eg sjálv. Spurningar frá børnum, eg havi svarað, logið um ella káva útyvir, hava verið: Hvar býr hann? Kemur hann eisini til mín jólaaftan? Hvørt ár? Gevur hann mær tað, sum eg ynski mær? Kann eg skriva honum bræv? Hví vitjar hann hjá grannunum hvørt ár og her hevur hann bara verið einaferð? Hava vit nakran skorstein og hvussu sleppur hann niður í? Kunnu reinsdjór flúgva? Hví eru fleiri jólamenn? Brúka tey strikukodur á verkstaðnum hjá jólamanninum? Hví er alt góðgæti í hosuni sama slag sum tað í spískamarinum hjá okkum?

Tað sum børnini uppliva nú, er ein ørgrynna av jólamonnum, í fleiri vikur fyri jól. Teir búgva fyrst og fremst í handilsumhvørvum, annars eisini í Grønnlandi, Finnlandi, Sámalandi, Noreg og uppi í fjøllunum. Verða fluttir við skipi, tyrlu, sjúkrabili, brandbili ella sleðu. Summir geva gávur, aðrir góðgæti og teir ordiliga keðiligu geva bara frukt ella piparnøtir. Summir eru ordiliga fittir, áhugaðir og prátingarsamir, aðrir siga einki. Onkur prátar sandsmál, annar dankst. Viðhvørt eru teir í loftmiðlunum, men ikki allir eru so fínir. Men felags fyri teir allar er, at sera nógv smábørn hava eina fullkomiliga nattúrliga frykt fyri hesum lodnu og grovmæltu ókunnumonnum, inntil tey finna útav at tey kunnu FÁA.

Eg fari tí við hesum, at skjóta upp, at vit lata jólamannin vera eftir í 20. øld, sum eina forna leivd, og í staðin finna okkurt annað at lúgva fyri børnunum um. Mytir og traditiónir hava allar sína tíð, og tá ið tær ikki eru hóskiligar longur, verða aðrar settar í staðin.

**NATRUAL BORN KILLERS.** Í apríl mánaði í fjør drupu tveir 17 ára gamlir skúlanæmingar 13 fólk og særdu fleiri enn 100 á einum miðnámsskúla í USA. Frammanundan høvdu teir greitt einum upptøkutóli frá, hvat teir hugsaðu um áðrenn blóðbaðið

# Columbine-bondini

*Eyðun Klakstein*

13 fólk lótu lív, og fleiri enn 100 vórðu særd, tá tveir ungir mans skutu frá hond á Columbine-skúlanum í amerikanska býnum Littleton fyri 9 mánaðum síðani.

Tað var fyrrapartin tann 20. apríl, at Eric Harris og Dylan Klebold gingu berserkagongd á sínum egna skúla. Teir skutu floksfelagar, kenningar og lærarar, áðrenn teir góvu sær sjálvum eina kúlu fyri pannuna.

Friðarligi býurin nærindis Denver í Colorado var alt í einum vorðin pallurin fyri eini blóðugari niðurskjóting av tilvildarligum ungfólki.

Tann dag í dag ekkóa skotini í Littleton. Avvarandi eru ikki komin fyri seg enn, og amerikanska samveldisløgreglan ger framvegis kanningar í býnum.

Og beint undan jólum kom virda tíðarritið Time við eini skelkandi avdúking.

Í vikunum undan drápunum høvdu teir báðir drápsmenninir upptikið fimm sjónbond av sær sjálvum. Sjónbond, sum teir vónaðu skuldu vísast kring alla klótuna og sum skuldi gera teir heimskendar. Kendir leikstjórar fóru at stríðast um rættindini til søguna, spáddu teir.

Á hesum bondunum, sum verða rópt Columbine-bondini, greiða Eric Harris og Dylan Klebold frá sínum ætlanum, og hví teir stutta tíð seinni vóru frá sær sjálvum í einum blóðrúsi á skúlanum, har teir høvdu traðkað mangt fótasporið.

Tað kostaði 13 fólkum lívið, fleiri enn 100 vóru særd, og enn fleiri vóru rakt so ella so sum avvarðandi.

### Vápn og Whiskey

Tað var ein blanding av hatri, øvund, undirlutakenslu og eini sjúkligari trongd eftir at gerast kendir, sum var orsøk til hópdrapið í Littleton.

Hetta vísa sjónbondini, sum fyrstu ferð komu í ljósmála, tá journalistar á Time tíðarritinum, eftir kanningararbeiðið í fleiri vikur, fingu fatur á bondunum. Løgreglan hevði annars hildið bondini loynilig fyri øllum, tí vildu ikki geva drápsmonnunum óneyðuga nógva umtalu.

Á einum av upptøkunum, sum samanlagt eru tríggjar tímar til longdar, situr Eric Harris við eini avsagaðari fuglabyrsu í fanginum og eini Whiskeyfløsku í hondini. Undir liðini á honum situr Dylan Klebold við tannsteytara í munninum, og saman sita teir og breggja sær av sínum ætlanum um eitt hópdráp á Columbine-skúlanum.

Byrsuna rópar Eric fyri Arlene, og tað navnið hevur hann fingið úr spælinum Doom. Og eftir at hann hevur fingið sær upp í munnin av Whiskey vissar hann øll, sum í framtíðini fara at síggja sjónbandið, um, at teirra ætlan er orginal, og at teir als ikki fara at eftirapa skottilburðum, sum stutt frammanundan høvdu verið í Oregon og Kentucky.

- Hesum tilvildarligum skottilburðunum stóðu børn, sum so gjarna vildi verða góðtikin, fyri, siga Eric.

Sítt álop á skúlan hava Harris og Klebold lagt til rættis í eitt heilt ár, og teir ætla at raka teir vælbjargaðu næmingarnar og ítróttarstjørnurnar meinast. Einum næmingi ætla teir at “skjóta kjaftin av”, og ein annar skal “skalperast”, sum teir taka til.

Á einum bandi reksa teir báðir nøvnini upp á teimum gentunum, sum hava sagt nei til at fara í býin við teimum. Eric Harris gremur seg um, at hann verður argaður orsaka av síni útsjónd, sínum hári og klæðunum, hann gongur í.

### Hataðu øll

Hatrið er næstan ótømandi, og øll standa fyri skotum.

- Vit hata øll. Hvít, myrk, meksikanarar, gýðingar, kvinnur, trúgvandi og geykara. Vónandi drepa vit 250 av tykkum, froysir Dylan Klebold á einum av bondunum.

Einastu fólkini, sum sleppa undan ágangi á sjónbondunum, eru foreldrini hjá teimum báðum, og tað er sjón fyri søgn, at teir kenna Shakespeare, tá teir sitera hann fyri fylgjandi: Good vombs hath borne bad sons. Hetta verður gjørt í eini hjálparleysari roynd at lætta um sorgina og ábyrgdarkensluna hjá foreldrunum, eftir at teir hava gjørt álvara av síni blóðugu ætlan.

Amerikanska samveldisløgreglan er ikki í iva um, hví teir báðir ungu menninir skutu frá hond á skúlanum. Teir vildu gerast kendir, og teir vildu vísa øllum, hví teir gjørdu sum teir gjørdu.

Á seinasta pettinum av upptøkunum hjá Klebold og Harris siga teir farvæl til foreldrini hjá sær, áðrenn teir fara avstað til skúlan fyri at gera álvara av teirra ætlan.

- Mær hevur ongantíð dámt lívið, og tit skulu bara vita, at eg eri á veg til eitt betri stað enn hetta, sigur Dylan Klebold.

- Hatta var tað. Vit mugu avstað. Farvæl, eru seinastu orðini hjá Eric Harris.

Stutta tíð eftir tað rungaðu fyrstu skotini á Columbine-skúlanum.



**Í vikunum undan drápunum høvdu teir báðir drápsmenninir upptikið fimm sjónbond av sær sjálvum. Sjónbond, sum teir vónaðu skuldu vísast kring alla klótuna og sum skuldi gera teir heimskendar. Kendir leikstjórar fóru at stríðast um rættindini til søguna, spáddu teir.**

2´arin
**Tíðindablaðið Sosialurin**. **Postadressa:** Postboks 19, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720.
**Email til 2’aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjórn:** Eyðun Klakstein
**Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Hálvur føroyingur - reinur gyklari



**GYKLARI.** Jacob Haugaard er maðurin, ið trýr uppá einglar, hatar autoritet og sum koyrdi Cadillac, áðrenn hann dugdi at lesa. Hann er fólkavalda skemtisøgan í Danmark. Hann er gyklarin, ið hevur búð í skúrvogni millum drykkjumenn og gleðisgentur. Hálvi føroyingurin hevur fingið lívssøgu sína út í bók

*Dagfinn Olsen*

Blaðkvinnan Helle Møller Christensen hevur skrivað bók um lívsleiðina hjá gyklaranum Jacob Haugaard. Bókin nevnist „En gøgler på strandvejen“. Her verður greitt frá lívsleiðini hjá Jacob, ið hevur mammu av Tvøroyri, og bókin er avgjørt ikki keðiligur lesnaður.

Vit fylgja Jacob frá fyrstu árunum, tá hann saman við vinmanninum Kurt Thorsen bindur eitt havahús fast í Cadillacbilin hjá pápa Kurt. Orsøkin er, at ríki handilsmaðurin Thorsen hevur vitjan av japanarum, ið ikki heilt trúgva, at reipið, ið hann ætlar at selja teimum, er nóg sterkt. Fyri at hjálpa, gera vinmenninir fast millum hús og Cadillac, sum Kurt hevur í gongd við at trýsta fast á speedaran. Teir eru glaðir, tá tað heldur og húsið flýgur fram í bilin.

### Til Føroya á traktori

Mangar eru søgurnar frá barna- og skúlaárunum.

Vit hoyra eisini um ferð til Føroya. Eftir seinna veraldarbardaga, í 1948, hittast foreldrini hjá Jacob. Pápin, Åge, fær arbeiði sum timburmaður í Føroyum. Hann hittir Kathrinu, sum er undir útbúgving til sjúkrasystir. Jacob kemur í verðina 12. maj 1952. 4 mánaðar seinni flyta tey til Danmarkar.

Men tey vitja ofta aftur, men einaferð er við at enda galið hjá lítla Jacob, ið er sera forvitin og marksøkjandi. Tey ferðast við skipi til Føroya. Ljóðið frá einum motori leypur fjáltur á Trinu og Åge. Tey taka minnu systkini, Jan og Agnes, og halda avstað.

Ljóðið kemur frá einum traktori, ið stendur fremst á dekkinum. Á honum situr 5 ára gamli Jacob, ið hevur sett motorin í gongd og hevur kós útav stokkinum. Ein dekkari bjargar í síðstu løtu dreingi og traktori frá druknideyðanum. Eftir hetta verður Jacob bundin saman við systkjunum á ferðunum til Føroya.

Omma Jacob, Frida, setur dám á dagarnar hjá Jacob í Føroyum. Hon er full í pátrúgv og nógv má Jacob sjálvsagt kanna sjálvur.

Eina nátt á Hvítanesi á Tvøroyri minnist hann sera væl. Hann hevði hoyrt søguna um, at húsini á Hvítanesi vóru gandaði. Tey vóru bumbað undir krígnum og høvdu ikki staðið still síðani. Eina náttina gekk toran. Jacob hoyrir róp: Jesus, Jesus:

Uppi í songini stendur omman, ið annars altíð er vøkur og fín, í slitnum náttkjóla og við langa, gráa hárinum hangandi leysum og við ongum tonnum. Samstundis kastar eitt snarljós ljós inn í rúmið.

### Løtt og ærlig

Bókin er full av søgum frá ungdómsárunum og skúlatíðini, har hann finnur fyrstu unnustu sína og langt um leingi fær HFprógv við 5,7 í miðal. Hesum letur hann sær tó ikki steðga av, men fer til Tunesia saman við vinfólkum. Tey sláa tjald upp og vakna næsta morgun við trompetblástri. Síðani fara skotsalvurnar ígjøgnum luftina. Tey hava sett tjøld upp á einum hernaðarvenjingarstað.

Soleiðis ganga árini. Teir fyrstu tónleikabólkarnir síggja dagsins ljós. Við hesum kemur Jacob inn á pallin og lívið á hallandi fjalunum byrjar. Og lívið tykist ganga sama veg, sum fjalarnar.

Jacob er fastur gestur til veitslur, men hini møðast av honum, tí hann drekkur meira og skjótari enn tey.

Heldur ikki á pallinum fáa fólk frið at leika, uttan at Jacob skal ímillum. Samstundis er hann maðurin aftanfyri mangar løgnar hendingar ella „happenings“. Eisini hevur hann hug at bjóða av í ríkiligt mát, tí oftast eru mótstøðumenninir væl størri og sterkari, enn hann er sjálvur.

Hann gerst kendur í umhvørvinum í Århus, sum maðurin, ið býr í einum skúrvogni. Ein vinmaður gerst illa við, tá hann eftir nøkur ár hittir Jacob á gøtuni. Hann er ávirkaður og stríðist við at seta danabrókfløgg í hundalortar.

Bókin er bersøgin. Vit hoyra um søguna, tá hann skrivar sangin „Haveje“, sum Kim Larsen gjørdi kendan.

Seinni hoyra vit um tað, ið vit kenna meira til í lívinum hjá Jacab. Samstarvið við Finn Nørbygaard, uppstillingar til fólkatingsval og so framvegis.

### Avvenjing

Í 1992 verður Jacob innlagdur og fer til avvenjingar fyri rúsdrekkamisnýtslu.

Bókin er løtt, ærlig og alt annað enn keðilig at lesa. „Eg havi upplivað tað villast hugsandi í lívinum og havt stórar niðurtúrar. Men eg eri eitt korkpropp menniskja, ið altíð kemur uppaftur“, sigur Haugaard.

Forlagið Høgsted & Høgsted gevur út.



**Standmyndin Jacobka´pis, ið Jacob lat gera fyri floksstuðul sín, stendur í Tuborg Havn**